UTTAN ÚR HEIMI

Setti sjálvur eld á

Ein svenskur sløkkiliðsmaður hevur viðgingið, at hann var upphavsmaðurin til fleiri eldsbrunar.

Sambært blaðnum Expressen var sløkkiliðsmaðurin komin í fíggjarligar trupulleikar, eftir at hann hevði keypt sær hús, bil, sjónvarp o. a. Hann hevði ilt við at gjalda alt, og tá lánveitararnir fóru at gera vart við seg, fann maðurin upp á ráð. Hann visti, at hann kundi fáa 164 krónur eyka fyri tann fyrsta tíman og síðani 109 krónur hinar tímarnar, hvørja ferð eldur var í onkunstaðni.

Løgreglan í Pålsboda stóð á berum, tá ikki færri enn ellivu eldsbrunar herjaðu býin seinasta summar, men sum frá leið eydnaðist tað løgregluni at staðfesta, at her ruggaði ikki rætt. Nú hevur sløkkiliðsmaðurin so viðgingið, at tað var hann, sum setti eld á - fyri at fáa pengar til at gjalda skuldina.

Ov nógvir bøndur

Kommunistaflokkurin í Kina er komin til ta niðurstøðu, at landið hevur alt ov nógvar bøndur.

Umleið 69 prosent av øllum kinesarunum ella einar 900 milliónir fólk búgva á bygd, men nú hava myndugleikarnir gjørt av at flyta ein stóran part av teimum inn í býirnar at búgva. Tilsamans er talan um millum 150 og 380 milliónir fólk, og tey næstu tjúgu árini ætla myndugleikarnir at flyta millum 12,5 og 19 milliónir fólk av bygd inn í býirnar. Málið er, at um tjúgu ár skulu bert millum 40 og 50 prosent av kinesiska fólkinum búgva á bygd.

Samstundis ætla myndugleikarnir at seta eina rúgvu av almennum arbeiðum í gongd fyri at forða fyri arbeiðsloysi. Eitt nú er ætlanin at bøta um samferðslukervið við at leggja eina jarnbreyt til Tibet og at grava eina veit frá Yangtze-ánni norður til Beijing. Samstundis skal landbúnaðurin nútímansgerast.

Kuffertið sprongdist

Ein maður, sum arbeiddi á flogvøllinum í jordanska høvuðsstaðnum Amman, doyði, tá eitt kuffert brádliga fór í luftina.

Jordanska løgreglan sigur, at ein japanskur tíðindamaður átti kuffertið, og tíðindamaðurin er nú tikin. Tíðindastovan Petra skrivar, at tíðindamaðurin hevði verið í Irak, og at hann hevði tikið eina granat við sær sum eitt minni um kríggið í Irak.

Kuffertið skuldi umborð á eitt flogfar hjá egyptiska flogfarinum EgyptAir, sum stóð í floghavnini í Amman. Jordanska løgreglan sigur, at bæði starvsfólk og ferðafólk gjørdust ræðslusligin, tá granatin í kuffertinum brast.

Loysir seg ikki at gera pengar

Norski tjóðbankin hevur gjørt av at, at arbeiðið at gera norskar myntir og pengaseðlar skal bjóðast út. Orsøkin er stutt sagt, at tað loysir seg ikki hjá bankanum at gera arbeiðið. Útreiðslurnar eru lutfalsliga stórar, og harafturat noyðist tjóðbankin at gera íløgur í nýggja útgerð um stutta tíð, skal hann framvegis gera seðlarnar og myntirnar.

Leiðslan í tjóðbankanum hevur longu tosað við eina finska verksmiðju um at gera tær norsku myntirnar, og hesar samráðingar eru komnar so væl ávegis, at finska verksmiðjan helst fer at gera tær fyrstu myntirnar í 2009. Arbeiðið at prenta pengaseðlarnar verður ætlandi boðið út á altjóða marknaðinum, so prentsmiðjur víða um heimin kunnu bjóða upp á arbeiðið.

Tað er kortini ikki tjóðbankin, sum hevur tað endaliga orðið at siga í slíkum málum, men fíggjarmálaráðið.

Kríggið í Irak er liðugt - so at siga

Bush forseti á dekkinum á flogberanum "Abraham Lincoln"

Á dekkinum á flogberanum "Abraham Lincoln" boðaði George W. Bush, forseti frá, at tað hernaðarliga kríggið í Irak er liðugt. Men hvat nú tað veruliga málið við krígnum?

IRAK
Árni Joensen

Tá amerikanski forsetin í næstsíðsta mánað boðaði frá, at nú var kríggj í Irak, sat hann aftan fyri skrivstovuborðið í Hvíta Húsunum. Nú hann boðaði frá, at hetta sama kríggið yvirhøvur er at enda komið, var pallurin ein annar. Hesaferð stóð forsetin langt úti í Kyrrahavinum á dekkinum á flogberanum "Abraham Lincoln", sum er á veg úr Persaflógvanum til San Diego í Kalifornia.

Undan røðuni var fráboðað, at forsetin fór at boða frá, at tey stóru hernaðartiltøkini vóru liðug. Orðini eru vald eftir umhugsan. Hevði forsetin sagt, at kríggið var liðugt, høvdu reglurnar í Genevesáttmálanum komið í gildi. Tær siga millum annað, at krígsfangar skulu latast leysir, og at taparanir kunnu ikki fyribeinast. Tað hevði eitt nú borið í sær, at Saddam Hussein kann ikki fyribeinast, verður hann funnin.

Harafturat var tað trupult hjá Bush at kunngera kríggið liðugt, tí amerikanskir hermenn verða dagliga álopnir í Irak. So seint sum hósdagin vórðu sjey amerikanskir hermenn særdir, og fyrr í vikuni skutu hermenninir 16 irakar í samanbresti í býnum Falluja.

Eygleiðarar spyrja nú, um tann uppgávan, sum Bush lovaði at loysa, tá hann boðaði frá krígnum, er loyst. Tá segði forsetin, at tað var neyðugt at leypa á Irak fyri at verja Amerika og onnur ímóti, at Saddam Hussein og hansara yvirgangsvinmenn skuldu leypa á við sínum hópoyðingarvápnum. Hann segði seg vera sannførdan um, at Irak hevði og fjaldi hópoyðingarvápn, og at irakar høvdu vant yvirgangsmenn, eisini limir í al-Qaeda.

Enn hava amerikanararnir ikki kunnað prógva, at forsetin segði satt, siga eygleiðararnir. Nakrar ferðir hava teir tosað um, at hermenninir hava funnið illgrunasamar tunnur og annað, men prógv eru eingi. Og teir vilja ikki hava Hans Blix og hansara vápnaeftirlitsmenn at leita.

Samstundis er ymiskt hent í Irak, sum Bush neyvan hevði í tonkunum, tá hann boðaði frá krígnum. Shiittiskir muslimar gera vart við seg, og USA leggur Iran undir at eggja teimum til uppreistur.

Og 1. mai skipaði irakski kommunistaflokkurin fyri mótmælisgongu í Bagdad. Tað kann tykjast sum lagnunnar speisemi, siga eygleiðarar, at USA fer í kríggj við Irak, so iraksku kommunistarnir kunnu koma til orðanna. Men har var eingin tøkk at hóma. Á skeltunum hjá kommunistunum vóru boðini greið: Amerikanararnir skulu av landinum.

Tann hernaðarligi parturin av krígnum er av, men stríðið fyri friðinum er valla byrjað.

Blair fekk ein frammaná

Arbeiðaraflokkurin hjá Tony Blair, forsætisráðharra tapti lokalvalið. Irak-kríggið var orsøkin.

BRETLAND
Árni Joensen

Tony Blair, forsætisráðharri og Arbeiðaraflokkurin vóru fyri einum eyðmíkjandi ósigri á bretska lokalvalinum hósdagin.

Arbeiðaraflokkurin misti umleið 700 sessir, meðan teir konservativu vunnu 542 og teir liberalu 150.

Úrslitið var so vánaligt hjá Arbeiðaraflokkinum, at undirtøkan er tann minsta, sum flokkurin hevur havt síðani í sjeytiárunum. Hóast valið yvirhøvur snúði seg um lokal viðurskifti, ivast eygleiðarar ikki í, at tað var mótstøðan ímóti bretsku luttøkuni í Irakkrígnum, sum kostaði stjórnarflokkinum dýrt.

Úrslitið hevur ongan beinleiðis týdning fyri Blair og stjórnina, tí flokkurin hevur avgjørdan meirluta í parlamentinum, og parlamentsval verður ikki aftur fyrr enn um trý ár.

Hinvegin hevði úrslitið stóran týdning fyri konservativa leiðaran, Ian Duncan Smith. Hevði flokkurin ikki fingið framgongd, hevði Duncan Smith ivaleyst verið noyddur at leggja frá sær.

ítróttur
Nr. 84 • leygardagur • 3. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið

03.05	17.15	B68-KÍ	Birgir Sondum
04.05	15.00	GÍ-FSV	Eiler Rasmussen
04.05	15.00	EB/S-B36	Petur Skarðenni
04.05	16.00	NSÍ-HB	Suni Johansen

B68-KÍ:

Allan og Ove ivasamir

Allan Joensen er saman við Ova Nysted ivasmur til dystin móti B68, og í so máta man tað koma illa fyri, at hann er framskundaður til leygardagin

Hjá B68 eru allir spælararnir tøkir, meðan tveir av lyklaspælarunum hjá KÍ eru rættuliga ivasamir undan fjórðingsfinaluni, sum verður seinnapartin í dag

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Tá ið KÍ í 1991 vann FM fyri fyrstu ferð í nítjan ár, var Petur Mohr, sum nú hevur ábyrgdina av B68, venjari. Millum ungu spælararnar, sum vóru við til at vinna FM heitið til Klaksvíkar, vóru Jan Joensen og Olgar Danielsen. Nú eru hesir ávikavist venjari og hjálparvenjari hjá KÍ.

Hvørki B68 ella KÍ vóru sannførandi í bólkaumfarinum, og leingi var møguleikin stórur fyri, at bæði toftamenn og klaksvíkingar ikki skuldu halda fram í kappingini. Men so lagaði tað seg soleiðis, at bæði liðini endaðu á næstfremsta plássinum, og tá ið B68 var besti tveyarin hevði tað við sær, at teir eiga heimavøll í fjórðingsfinaluni. Dysturin verður spældur seinnapartin í dag klokkan 17.15.

Felags fyri B68 og KÍ er, at feløgini ikki hava serligar steypatraditiónir. KÍ hevur vunnið FM seytjan ferðir. Steypahagtølini siga, at KÍ finalusigrarnir bara eru fimm – ísafjarðarsúlusigrar í 1966 og 1967 og finalusigrar í kappingini um løgmanssteypið í 1990, 1994 og í 1999.

B68 hevur vunnið trý FM heiti – í 1984, 1985 og í 1992 – men B68 hevur framvegis fyrsta finalusigurin í steypakappingini til góða. Næst við vóru teir í 1995, tá ið teir fyri fyrstu og higartil einastu ferð vóru í finaluni. Tá var Petur Mohr eisini venjari. Ta ferðina tapti B68 ímóti HB.

B68 er væl fyri undan fjórðingsfinaluni. Øssur Jacobsen hevur verið skaðaplágaður, men hann venur aftur við fullari ferð. Jan Ingi Petersen og Fróði Benjaminsen skulu í dag vísa, at tað ikki bara er á landsliðnum, at tað er dugur í teimum á miðvøllinum. Saman við Hans Fróða Hansen vóru teir orsaka av landsdystunum ímóti Kasakstan burtur frá B68 venjingini í eina lítla viku.

Lyklaspælarar ivasamir

Hjá KÍ er ikki so væl vorðið, sum tað er hjá B68. Allan Joensen er sera ivasamur, og Ove Nysted gavst beinanvegin at venja hóskvøldið. Í gjárkvøldið skuldi KÍ hava lætta venjing, og tá fekst at síggja, um haldið í rygginum hjá Ova var horvið.

Allan Joensen varð skaddur í tjúkkanum undir venjing á landsliðnum mánadagin. Hann hevur ikki vant síðani, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður tøkur í dag. Ove og Allan verða mettir sum tveir av týdningarmestu spælarunum hjá KÍ.

Undan skaðunum kendi KÍ venjarin, Jan Joensen, seg at hava fimtan spælarar, ið bilaðu til tey ellivu plássini. Erling Fles og Eyðun Klakstein hava staðið seg væl í álopinum í trimum teimum síðstu dystunum í bólkaumfarinum, og Sámal Eyðfinn Poulsen hevur víst sera góðan stríðsvilja. Men nú er tað okkurt, sum bendir á, at venjarin ikki verður noyddur at seta fleiri góðar spælarar á beinkin í dag.å

Manslandsliðið klárt

Nú er eisini gjørt av, hvørjir skulu manna manslandsliðið í flogbólti á Oyggjaleikunum

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Eins og hjá kvinnunum, so høvdu Jesper Briox og Suni Hansen ein bruttohóp til venjingar um vikuskiftið. Venjingar, sum skuldu gera av, hvørjir teir 12 skuldu verða, sum sleppa við á komandi oyggjaleikirnar.

Umframt oyggjaleikirnar, so er ætlanin hjá FBF, at menninir á sama hátt sum kvinnurnar fáa møguleikan at taka lut í evropeisku kappingini í C-bólkinum, umframt at venjingardystir vónandi verða leiktir móti Íslandi.

Teir 12, sum nú hava fingið boð, eru hesir:

Bartal Eliasen, ÍF
Johan Petur á Stongum, SÍ
Rúni Weihe, ÍF
Andrass Jógvansson, Fleyr
Ragnar Petersen, Fram
Jan Áki Olsen, ÍF
Bárður Bendix
Mikkelsen, Holte Volley
Johan Nielsen, ÍF Føroyar
Jen Heri Bolstad
Mortensen, Fram
Odd Eliasen, ÍF
Heini Weihe, Fram
Suni Juul Petersen, Fram